**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

*STUÐULSSKIPANIN FYRI VAKSIN*

# Stuðul

## til Stuðulsskipanina fyri vaksin

Stuðulsskipanin fyri vaksin søkir eftir einum stuðli til brúkara í Vágum. Tann, ið settur verður, fer i samarbeiði við øðrum stuðlum at arbeiða í skift-andi vaktum. Starvið er normerað til 33 tímar um vikuna, at byrja hálvan august ella eftir nærri avtalu.

**Førleikakrøv:**
Stuðulsskipanin ynskir ein stuðul við viðkomandi útbúgving m.a. heilsuatstøðing, pedagog, ergoterapeut ella líknandi útbúgving. Onnur eru tó vælkomin at søkja.

**Vit vænta, at tú:**
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans.
- Ert tolin og hevur eina positiva menniskjafatan.
- Kanst handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið onki kann sigast um frammanundan

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Ser-forsorgina. Løn sambært sáttmála millum avvarð-andi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagum.

Nærri fæst at vita um starvið hjá Einu Andreasen ella Odu Jóhansdóttir á tel. 354020.

Umsókn saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu innan 01.08.2006 sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Att.: Oda Jóhansdóttir
Løkjatún 1, F0 –160 Argir
Tlf: 354020 · Telefax 354021

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

*SERSTOVNADEILDIN*

# Pedagogur og hjálparfólk

## til Sambýlið á Mýrini 4-6 í Hoyvík

Innan Almanna- og heilsumálaráðið og stovnum undir tí, við fyribils tænastu á Sambýlunum á Mýrini 4-6 í Hoyvík, er 1 pedagogstarv leyst at søkja til setan 15. august 2006 ella eftir nærri avtalu. Talan er um eitt fulltíðarstarv, og er arbeiðstíðin 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Vit sóknast eisini eftir einum hjálparfólki til setan 15. august 2006. Talan er um eitt hálvtíðar-starv, og er arbeiðstíðin 20 tímar um vikuna sum morgunvakt.

Sambýlini á Mýrini eru heim hjá 10 vaksnum menningartarnaðum búfólkum. Arbeiðið fevnur millum annað um at vegleiða og hjálpa búfólkum í øllum tí, sum tey hava tørv á. At menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi. At skapa trivna og tryggja búfólkinum menningarmøguleikar og saman við teimum skipa gerandisdagin. Talan er í ein ávísan mun um eldri røktarkrevjandi búfólk.

Dentur verður lagdur á, at tann ið sett/ur verður, hevur evni og vilja at samstarva og samskifta við okkara avvarandi og starvsfelagar, er sjálvstøðug/ur, likamliga og sálarliga væl fyri, fleksibul, kreativ/ur, dámar væl avbjóðingar, er ágrýtin og opin fyri nýhugsan.

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið sum pedagogur er eitt tænastumannastarv, og setanin er sambært avtalu millum Føroya Peda-gogfelag og Fíggjarmálaráðið, lønt eftir stiginum 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Hjálparfólki verður sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið fyri sáttmálasett hjálparfólk.

Nærri fæst at vita um størvini frá leiðaranum á tlf. 211478.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Sambýlini á Mýrini**
Att. Leiðarin
Á Mýrini 4-6
188 Hoyvík

**Umsóknarfreist er 24. juli 2006 kl.12:00**

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

*HEIMARØKTIN*

# Røktarstarvsfólk

## til Heimarøktina í Suðurstreymoy

Undir Heimarøktini og Serforsorgini við fyribils tænastu í Heimarøktini Suðurstreymoy sóknast vit eftir starvsfólki við hóskandi røktarfakligari útbúgving at starvast í blandaðum vaktum bæði úti í Heimarøktini og inni á eldrasambýlunum, ið hoyra til økið. Størvini eru leys at søkja frá 1. september 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Talan er um:**
- **1 sjúkrarøktarfrøðing 32 t. um vikuna.**
- **1 sjúkrarøktarfrøðing 32 t um vikuna í av-loysarastarvi frá 1. september 2006 til 31. juli 2007**
- Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur 2 ára starvs-royndir innan primera og sekundera heilsu-stovnin.

**3 heilsuhjálparar 30 t. um vikuna**
Heilsuhjálpari við heilsuhjálparaútbúgving hevur fyrimun. Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur við-komandi starvsroyndir.

**Løn og setanartreytir**
Lønar – og setanarviðurskifti eru sambært sátt-mála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkis-felag.
Meiri fæst at vita um størvini á telefon 31 72 49

**Umsókn**
Umsóknir saman við prógvi, autorisation og upplýsingum um arbeiðsroyndir skulu sendast til:

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
Att. Økisleiðarin
Skálatrøð 14
FO 100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 14. august 2006 kl. 12**

**Brennistøðin á Hagaleiti**

# Móttøka av burturkasti

Brennistøðin tekur bert ímóti burturkasti, sum loyvi er givið til frammanundan.

Net skal vera spent yvir burturkast, sum verður koyrt í opnum lastum.

Allir lutir skulu vera smærri enn 100x50x50 cm, tó skulu timburstokkar vera styttri enn 50 cm.

Papp, bildekk, trolnet, gørn og plaststórsekkir sklu endurvinnast.

IRF

Kontórtíð frá kl. 8.00-16.00
Tlf. 473300 · Fax 473340
Heimasíða: www.irf.fo
Teldupostur: irf@irf.fo

**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins største úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820

# Frá Havnar Róðrarfelag

Tilmelding til niðanfyrinevndu róðrar er innan týsdagin 25. juli 2006 á telefon 218484.

- Old girls róður við 5-mannaførum.
- Old boys róður við 8- og 10-mannaførum.
- Róður við gomlum 6-mannaførum.

Við róðrarkvøðu.

**Havnar Róðrarfelag**
sí www-drekin.fo

# Leiga av Ítróttar-høllini í Runavík

Tey, ið ætla at leiga ítróttarhøllina í Runavík veturin 2006/2007, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 10. august 2006.

**Runavíkar Kommuna**